# Reglugerð

**samsvarandi lógini um Meginfelag áhugaleikara Føroya**

---

1. **Endamál**
   Meginfelag áhugaleikara Føroya (MáF) skal stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentanargrein í Føroyum við m.a.:

   - ***at*** menna og stimbra áhugan fyri leiklistini
   - ***at*** hjálpa sjónleikinum til best møgulig kor
   - ***at*** veita leiðbeining, ráð og upplýsing við skeiðum og øðrum útbúgvingartilboðum innan- og uttanlands
   - ***at*** útvega leikrit, útgerð og hjálp við leikuppseting
   - ***at*** útvega sjónleikinum fíggjarligan stuðul
   - ***at*** umsita stuðulin, so at hann gagnar sjónleikinum sum best

2. **Limafeløgini**
   Limir í MáF eru sjónleikarafeløg, bólkar og einstaklingar. Bygdafeløg eru at rokna sum bólkar við somu rættindum og skyldum sum aðrir leikbólkar. Limir í MáF fáa boð um skeið, sum MáF heldur, og teir eiga eisini framíhjárætt at koma á skeiðini, tá ið gravgangur er eftir plássum.

3. **Ung í MáF**
   Ung í MáF er ungdómsfelagsskapur í MáF. Endamál felagsins er at styrkja og menna leiklistaráhugaðan ungdóm í Føroyum. Ung í MáF verða fíggjað við stuðuli frá MáF og øðrum. Stuðulin frá MáF verður veittur til hvørja verkætlan sær. Roknskapur/váttað yvirlit yvir inntøkur og útreiðslur skal latast MáF fyri allar verkætlanir, ið hava fingið stuðul. Nevndin í Ungum í MáF arbeiðir og heldur sínar fundir í hølum MáF's, tá til ber. Tað verður gjørt eftir avtalu við umsitingarleiðaran. Umsitingarleiðarin skal vegleiða og hjálpa nevndini í Ungum í MáF, har tørvur er á tí. Øll leiklistaráhugað millum 14 og 30 ár kunnu gerast limir. Limir í Ungum í MáF fáa avsláttur av skeiðsgjaldinum í sambandi við skeið, MáF heldur.

4. **Nevndin**
   At fremja endamálini, nevnd í 1. grein, velur aðalfundurin 5 nevndarlimir og 2 varalimir sbrt. § 4 í lógini. Nevndin skipar seg straks eftir aðalfundin við formanni, næstformanni og kassameistara.

   Formaðurin boðar sjálvur ella gjøgnum umsitingina til nevndarfundar eina ferð um mánaðin ella so ofta, hann ella meirilutin í nevndini ella umsitingarleiðarin halda vera neyðugt.

   Nevndarlimur hevur skyldu til at boða umsitingini frá, um honum ikki ber til at møta. Avvarðandi tiltakslimur skal síðan straks fáa fundarboð. Ber honum heldur ikki til at møta, skal hin tiltakslimurin verða boðsendur.

   Fundarboð við fundarskrá og skjølum eiga, um gjørligt, at vera øllum nevndarlimum í hendi 5 dagar fyri fund.

   Fundarskráin skal vanliga taka við:

   Fundarfrágreiðing frá undanfarna fundi, sum verður góðkend og undirskrivað
   Fíggjarstøðu felagsins
   Innkomin mál
   Ymist

---

Formaðurin stjórnar nevndarfundunum, um ikki annað verður avtalað. Hann sær til, at nevndarlimirnir fáa høvi til at leggja fram sjónarmið síni og skal miða eftir at finna fram til niðurstøður, ið gagna samstarvinum, og sum semja fæst um.

Næstformaðurin tekur við, tá ið formanninum berst frá. Nevndin er viðtøkufør, tá ið minst 3 nevndarlimir eru á fundi.

Nevndin velur umboð í Leiklistaráðið og aðrar felagsskapir innan- og uttanlands. Hesi umboð kunnu veljast innan- sum uttannevndar, tó skal umboðið í Leiklistaráðnum vera nevndarlimur í MáF.

Skrivarin førir inn í gerðabókina samtyktir, niðurstøður og sersjónarmið. Orðingin eigur at verða góðkend so hvørt. Nevndarlimir og eykalimir fáa fundarfrásøgn sendandi og kunnu gera viðmerkingar til hennara á næsta nevndarfundi. Umsitingarleiðarin er skrivari á fundum, men berst honum frá, verður ein av nevndarlimunum valdur skrivari.

Kassameistarin skal saman við umsitingarleiðaranum syrgja fyri, at roknskapurin verður hildin í samsvari við lóg og samtyktir felagsins. Kassameistarin sær til, at øll neyðug roknskaparskjøl eru til taks, og at tey verða latin grannskoðara felagsins í góðari tíð - umleið 2 mánaðir fyri ársaðalfundin um grækarismessu.

5. **Umsitingarleiðarin**

ið ikki samstundis kann vera nevndarlimur í MáF, hevur dagligu leiðslu felagsins um hendi. Hann verður settur av nevndini og hevur ábyrgd fyri nevndini og aðalfundinum. Hann eigur at møta á aðalfundi og somuleiðis á nevndarfundi, um nevndin ikki frammanundan hevur tikið aðra avgerð. Hann hevur rætt til at seta fram uppskot og rætt til at taka orðið á nevndar- og aðalfundi, men hevur ikki atkvøðurætt.

Umsitingarleiðarin sær til, at fundarhølið er tøkt og somuleiðis, at tilfarið til málsviðgerðina er fingið til vega.

Umsitingarleiðarin virkar sum ráðgevi og leiðbeinari í sjónleikamálum, bæði til staklingar og feløg, sum fáast við sjónleik. Hann samskipar upplýsingar millum sjónleikahugað innan- og uttanlands, sendir út upplýsingartilfar og tilboð, krevur inn limagjøld, umbidnar hagtalsupplýsingar o.a. frá limafeløgunum.

Henda reglugerð fær gildi, tá ið hon er samtykt á nevndarfundi.

**Tórshavn, 5. mars 2009**

| | |
|---|---|
| *Hilmar Joensen, formaður* | *Eyð Matras, næstformaður* |
| *Sólvá Jónsdóttir, kassameistari* | *Jógvan E. Ósá, nevndarlimur* |
| *Heðin Mortensen, nevndarlimur* | *Petur Simonsen, varanevndarlimur* |